Tórshavn, hin 15.11.2019

Til Føroya Løgting

**Hoyringsskriv**

Føroya Landsstýri hevur lagt fylgjandi uppskot fyri Føroya Løgting í sambandi við pensjónir og mótrokningar av øðrum inntøkum v.m.:

Mælt verður til hesar broytingar:

1. **Løgtingsmál nr. 10/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.** (Lækking av mótrokning)
2. **Løgtingsmál nr. 11/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum** (Hækking av grundupphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd)
3. **Løgtingsmál nr. 20/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)** (Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið til fólkapensjónistar)

LÍV-samtakið heldur at hoyringsfreistin til omanfyri nevndu broytingar eru rættuliga stuttar, soleiðis at høvi tíverri ikki hevur verið at neyvlisið allar smálutir í uppskotunum.

Í sambandi við pensjónsøkið fer LÍV somuleiðis at vísa til hoyringsskriv sent Føroya Løgtingi í sambandi við Pensjónsnýskipanina (er hjálagt).

LÍV-samtakið ynskir at gera fylgjandi ítøkiligar viðmerkingar til uppskotini omanfyri.

1. **Løgtingsmál nr. 11/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum** (Hækking av grundupphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd)

Í omanfyri nevnda uppskotið verður í §1 nr. 1-6 m.a. nevnt um rað 2, 3 og 20. Hesi røð tykjast trupul at fyrihalda seg til, tí ein broyting í omanfyri nevndu lóg stendur at koma í gildi 1. januar 2020 (er í koming), sum eisini inniheldur "nýggj" røð". Tí er tað trupult at fyrihalda seg til hvørji røð hugsað verður um í uppskotinum. LÍV mælir til at fáa hetta gjørt greiðari, soleiðis at ongin ivi er um hvat meint verður við.

Í uppskotinum verður mælt til, at lækka verandi frádrátt í mótrokning av aðrari inntøku frá 60.000 til 40.000 (nr. 6). Hetta metir LÍV er óheppið fyri verandi fólkapensjonistar, sum hava lagt sær eftirløn v.m. til rættis út frá verandi fortreytum. Tí verður mælt til sum útgangsstøði at halda fast í verandi skipan.

2. **Løgtingsmál nr. 10/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.** (Lækking av mótrokning)

LÍV vísti í hoyringsskrivi í sambandi við Pensjónsnýskipanina, at høga mótrokningin av øðrum inntøkum (a-inntøka og inntøka frá m.a. privatari eftirlønarsamansparing) var ov høg. Um mótrokningin (av aðrari inntøku) gerst ov ógvuslig vil tað helst føra við sær "spekulatión" mótvegis skipanini. Privat eftirlønaruppsparing vil blíva harðari mótrokna enn uppsparing í øðrum aktivum (fastari ogn t.d.). Hetta er ein kendur trupulleiki í t.d. DK. Tí er tað av stórum týdningi at finna rættu javnvágina í sambandi við mótrokningina.

Tí tekur LÍV undir við at lækka verandi mótrokning. Við útgangsstøði í at livialdurin alsamt tykist verða hækkandi, fer LÍV at mæla Føroya Løgting til at umhugsa at hækka verandi eftirlønarkravið á 12% uppaftur á upprunaliga loftið á 15%. Hetta vil eftir LÍV'sa tykki økja um haldførið av eftirlønarøkinum.

Í verandi pensjónsnýskipan hava fólkapensjónistar møguleika at útseta fólkapensjónina og við hesum fáa eina hægri fólkapensjón. LÍV dugir ikki at síggja í verandi uppskoti at hetta verður broytt. LÍV vónar at nevndarviðgerðin kemur at avklárað um nakrar broytingar eru hesum viðvíkjandi. LÍV mælir til, ikki at gera broytingar hesum viðvíkjandi.

3. **Løgtingsmál nr. 20/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)** (Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið til fólkapensjónistar)

LÍV hevur onga ítøkiliga viðmerking til hesa broyting annað enn at henda broyting hjálpir uppá herðingina av frádráttarfríari inntøkuupphædd (undir pkt. 1 omanfyri).

-------------------- x------------------

LÍV vónar at fáa høvi til at greiða nærri frá ætlaðu broytingunum í sambandi við tær nevndarviðgerðir, sum fara at koma.

Um ivamál eru hesum viðvíkjandi, eru tit altíð vælkomin at venda aftur hesum viðvíkjandi.

Vinarligar heilsanir

LÍV-Samtakið

Jan Jakobsen, stjóri